# Borgarstjórin í Vági vónbrotin

**– Eg taki hetta ikki sum eitt persónligan ósigur, men hetta var ein ósigur fyri Suðuroy sum heild, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri**



*Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, í djúpum tonkum á býráðsfundinum týskvøldið. Hon royndi at tala sína søk, men tapti*

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg má viðganga, at eg eri vónbrotin.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági ásannar, at hennara allarfyrsti fundur á odda fyri Vágs Býráðið, gekk milt sagt ikki eftir vild hjá henni.

Størsta avgerðin á fundinum var, at býráðið samtykti at halda fast um, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági. Sostatt vil Vágs Býráð ikki tosa við landsstýrið um at gera ein skúladepil í Hovi. Býráðið er einans sinnað at tosað við Vágs Býráð um at byggja røktarheim í Suðuroy.

– Hetta var eitt vónbrot, tí eg haldi ikki at vit vita ítøkiliga, hvørjar ætlanirnar eru. Vit hava tikið eina avgerð, uttan at vit hava kannað allar møguleikar og tað haldi eg, er skeivt.

Sostatt heldur hon, at býráðið hevur tikið støðu í málinum uttan at tað er lýst út í æsir.

– Samstundis standa vit í teirri støðu í Suðuroy, at tað er stórt trot á almennum størvum og serliga er trotið stórt á størvum til konufólk.

Hon sigur, at eitt røktarheim hevði givið nógv størv til konufólk.

– Tí áttu vit atgjørt at tosa við landsstýrið fyri at vita, hvørjar ætlanirnar eru við einum skúladepli í Hovi og røktarheimi í Vági. Tá ið vit høvdu fingið greitt at vita, hvørjar ætlanir, landsstýrið hevði, kundi so býráðið tikið eina endaliga støðu. Sjálv mælti hon býráðnum til at taka upp samráðingar við landsstýrið um málið, men ein meiriluti av býráðnum vildi tað øðrvísi ogsamtykti at halda fast um at skúlin skal byggjast í Vági.

– Eg visti at tað fór at verða hips um haps, ti eg visti, at fleiri av býráðslimunum, sum eisini sótu í undanfarna býráði, fóru at standa við sína støðu. Eg visti eisini, at summir av teimum nývaldu vóru ivingarsamir og úrslitið varð so sum tað var.

*Var tað kravgongan sum gjørdi munin?*

– Kanska hon gjørdi munin hjá onkrum!

## Ein ósigur fyri Vág og Suðuroy sum heild

Helst hevur hon havt varhugan av, hvønn veg tað bar, tí áðrenn málið kom til viðgerðar, royndi hon at fáa tað útsett til næsta fund.

Til tá skuldi so býráðið tosa við landsstýrið fyri at fáa nærri at vita, hvørjar ætlanirnar vóru.

Men eisini tað uppskotið varð felt og sostatt varð hon tvær ferðir stemmað niður í málinum um skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági.

– Eg taki hetta ikki sum ein persónligan ósigur. Men eg haldi, at hetta var ein ósigur fyri Vágsbygd og allar Suðuroynna sum heild.

Hon vísir á, at spurningurin um skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági er ikki ein spurningur, sum viðkemur vágbingum einsamøllum. Heldur ikki spurningurin um miðnámsskúla er ein spurningur, sum viðkemur vágbingum einsamøllum.

– Vágbingar eiga ikki miðnámsskúlan einsamallir. Hann er fyri alla oyna og fyri alt landið og tí er tað skeivt av Vágs Býráði at viðgerða málið sum um at hetta er eitt mál fyri Vág burturav.

## Ikki ráð

Spurningurin er hvat fer at henda á eldraøkinum í Vági.

Kirstin Strøm Bech ásannar, at tað er ógvuliga avmarkað, hvat kommunan hevur ráð til einsamøll, tí inntøkurnar eru so nógv minkaðar.

– Vit fáa ikki tikið lán og einsamøll hava vit undir ongum umstøðum ráð til at byggja røktarheim ella ellisheim.

– Skulu vit tosa um at byggja sambýlið út, ber kommunan einsamøll meginpartin av kostnaðinum til bygginga og hon skal eisini betala ein part av rakstrinum. Og sum støðan er nú, liggur eisini tað nakað langt frammi í tíðini at byggja sambýlið út.

– Var talan um eitt røktarheim, skuldu allar kommunurnar í Suðuroy betalt 50% av byggingini í felag, samstundis sum landsstýrið hevur boðað frá, at tað er sinnað at finna eitt fíggingarmynstur sum gjørdi, at kommunurnar hava ráð at vera við.

Harafturat betalir betalir landið einsamalt allan raksturin av einum røktarheimi.

– Tí haldi eg at tað hevði verið sera áhugavert at vita ítøkiliga, hvørjar ætlanir, landsstýrið hevði og, hvussu landsstýrið hevði hugsað sær, at kommunurnar kundu fíggja eitt røktarheim, sigur Kirstin Strøm Bech.

Hon fer nú at boða landsstýrinum frá støðuni hjá Vágs Býráð.Og hon er, at býráðið heldur fast um, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági, men at býráðið vil hava fund við landsstýrið um at byggja røktarheim í Suðuroy.

– So fáa vit at síggja, hvørja støðu, landsstýrið hevur til tað, sigur hon.

## Skulu betala meiri til sambýli

Í samrøðuni við Hans Paula Strøm, landsstýrismann, í blaðnum í gjár, er ein feilur komin í, har tað verður greitt frá útreiðslubýtinum ímillum land og kommunur í sambandi við at byggja og reka røktarheim og sambýli.

Har stendur, at í sambandi við sambýli skal Vágs Kommuna einsamøll betala 90% av rakstrinum.

Hinvegin skal kommunan ikki betala eitt oyra av rakstrinum av einum røktarheimi.

Tað rætta er, at í sambandi við sambýli, skal kommunan betala 90% av sjálvari bygginingini. Hinvegin betalir landið raksturin. Tó skal kommunan sjálv betala náttarvaktirnar, umframt viðlíkahald.

Men í sambandi við eitt røktarheim betala landið og kommunurnar í økinum, hvør sína helvt av bygginingini.

Hinvegin betalir landið allan raksturin, sum hann er.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, ger eisini vart við, at honum hóvar ikki yvirskriftina á greinini.

Har stendur at »Vágbingar vilja bara hava uttan at lata nakað afturfyri«.

Hans Pauli Strøm sigur, at hetta eru ikki hansara orð. Tað er rætt, tí yvirskriftin er ein niðurstøða av tí, sum stendur sjálvari greinini.

Har stendur, at spurningurin um skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági, er eitt samlað tilboð til suðuroyingar. Men býráðið í Vági hevur samtykt, at tað heldur fast um, at skúlin skal byggjast í Vági, men at tað vil kortini tosa við landsstýri um røktarheim í Suðuroy.

Ì tí sambandi sigur landsstýrismaðurin, at vágbingar kunnu ikki bara taka tað burturúr samlaða tilboðnum, sum hóvar teimum best og nokta at tosa um tað, sum ikki hóvar teimum.

Og tað stendur landsstýrismaðurin framvegis við.

## Fyrimunur at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar

**Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, skjýtur enn einaferð upp at umisitingin av Strandferðsluni verður flutt til Suðuroyar**

MIÐFIRRING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, hevur enn einaferð skotið upp fyri Løgtinginum, at umsitingin av Stransferðsluni verður flutt til Suðuroyar.

Hann sigur ætlanin er at byggja eina farstøð á nýggju samferðsluhavnini og hann mælir nú til, at tað arbeiðið verður víðkað, so at tað eisini umfatar høli til umsitingina hjá Strandferðsluni.

Hann heldur, at tá enn ikki er farið undir farstøðina, er tað eitt sjálvsagt høvi til at víðka verkætlanina, fyri at gera tað so kostnaðarleyst sum til ber.

Hergeir Nielsen sigur, at tá ið undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfirði er komin, fer øll tann umsitingarliga tyngdin á Strandferðsluni, at viðvíkja Suðuroynni.

Og hann ivast ikki í, at tað stendst ein beinleiðis rakstrarfyrimunur av at flyta alla umsitingina av Strandfaraskipum Landsins nærri tí stóra talinum av brúkarum. Samtundis vildi hetta givið lokalsamfelagnum fleiri viðkomandi størv, samstundis sum hann heldur, at tænastustøðið verður hækkað munandi.

Hann vísur á, at verður umsitingin flutt í ein bygning í Suðuroy, slepst eisini undan leiguútreiðslum til ein umsitingarbygning í Havn.

Hann metir at tilsamans fara farstøðin og umsitingarbygningurin at kosta einar átta milliónir.

Saman við tí, sum er brúkt og játtað higartil, verður neyðugt at seta fimm milliónir av á næstu fíggjarlóg